# Eivør í dreymaverð

Hvussu verður ein føroysk sangarinna íslendsk fólkaogn? Tvey ár eftir at **Eivør Pálsdóttir** fór til Íslands at venda, hevur brøðratjóðin tikið hana til sín sum sína egnu systur. Íslendingar hava fingið nakað av tí, sum risin og kellingin komu eftir í síni tíð, og teir tykjast bara vilja hava meir. **Rúnar Reistrup** fylgdi føroysku sangarinnuni í døgunum undan útgávukonsert hennara í Reykjavík, og sá inn í eina dreymaverð

Nakrir hundrað áhoyrarar í íslendsku operuni hava reist seg frá stólunum og undir standandi fagnaðinum kappast snjalla ljóðið av klappandi hondum við djúpa runið av trampandi fótum um at fylla ljóðmyndina. Pallurin er tómur eftir eina konsert, sum íslendskir fjølmiðlar hava hitað stórar vónir upp til. Nú bara ein liggjandi kontrabassur og nakrar berar mikrofonir standa eftir er greitt, at eingin fer vónbrotin út í ta vetrarkøldu luftina. Áhoyrararnir hava verið ein túr í Føroyum, hava gjørt eina ferð aftur til føroysku tónleikarøturnar, og eru nú á veg fram eftir til Reykjavík 28. september 2003.

Í lágu sminkuhølunum undir operasalinum fylkjast stutt eftir tey innbodnu um eina 20 ára gamla gentu úr Gøtu, ið kom til Íslands fyri skjótt tveimum árum síðan, og sum við ovfarandi megi hevur sungið seg inn í hjørtuni á íslendingum - á føroyskum. Íslendsk plátufeløg hava staðið í kø fyri at sleppa at geva fløgu út við henni, og ein slík kom út í Íslandi herfyri - á føroyskum.

Eivør Pálsdóttir lýsir burturúr umhvørvinum, tá hon kemur gangandi oman eftir megin-handilsgøtuni í Reykjavík, har avtalan er, at vit skulu hittast. Klæðini í sterkum litum skína burturúr gráa degnum og regnváta vegnum, og sólbrillurnar mugu leita langt eftir teimum sólstrálunum, sum tær eru ætlaðar at verja ímóti.

**"Sjeikurin hjá mær eitur Pætur við Keldu. Hann býr í Keypmannahavn, har hann arbeiðir sum tónleikari", fortelur Eivør um unnusta sín, og íslendski blaðmaðurin er skjótur at spyrja meir um hendan góða Pætur**

Kanska er tað alt hetta ytra, sum ger, at fólk hyggja langt eftir henni, men neyvan er tað bara tað. Flestu teirra munnu kenna ungu damuna aftur. Hon hevur prýtt forsíður og fylt sendiflatur á útvarpi og sjónvarpi dúgliga hendan farna mánaðin, so tað hevur verið ringt hjá vanliga íslendinginum ikki at lagt merki til hana so ella so. Men Eivør tykist ikki at taka sær av tí.

"Gjørdu tey tað? Tað havi eg ikki lagt merki til" Eivør gerst ovfarin, tá eg løtu seinni spyrji hana, hvussu tað kennist, tá fólk venda sær eftir henni á gøtuni. "Eg veit at beint nú kenna flestu fólk í Íslandi meg. Men eg eri ikki kend upp á tann mátan at fólk vilja hava mín autograf og sovorðið. Tað er mest tí at eg havi verið so nógv í bløðunum og sjónvarpinum seinastu tíðina. Fólk vita bara hvør eg eri, og so er tað tað", heldur ein lítillátin Eivør fyri.

Men tað er ikki heilt rætt, tí Eivør er meira enn bara kend sum fitta snýðið á forsíðunum. Í hondini hevur hon nakrar yrkingar, sum ein fremmandur maður hevur givið henni stutt frammanundan. "Hann vildi hava meg at gera løg til nakrar tekstir, sum hann hevði skrivað", sigur Eivør uttan at vera tikin á bóli av tí. Hon verður tó ovfarin dagin eftir, tá ein eldri maður knapp-liga kemur til hana, avgjørdur um at lata henni ein gamlan gittar. "Hann segði at hann hevði hugsað nógv um hvør skuldi eiga hendan gittaran, men at nú var hann sannførdur um, at eg skuldi hava hann. Eg ani ikki hvør hann var, men eg helt ikki at eg kundi loyva mær at siga nei, so nú eigi eg ein gamlan gittar", fortelur Eivør dagin eftir um løgnu hendingina henni var fyri.

Eivør hevur avtalað at hitta tveir myndamenn og ein blaðmann í einum kaffihúsi á høvuðsgøtuni, so har fara vit inn. Skjótt kemur tann fyrsti myndamaðurin inn. Hann tekur Eivør við sær útum, og stutt eftir koma tey inn aftur saman. Myndamaðurin er ikki meira enn farin, áðrenn næsti myndamaður kemur inn. Eivør verður aftur hálað útum, meðan blaðmaðurin, sum er møttur upp í millumbilinum, ger seg til reiðar við bandupptakaranum. Hann skrivar fyri vikuskifti-blaðið hjá íslendska dagblaðnum DV. Ein góðan hálvan tíma situr Eivør og svarar spurningum á flótandi íslendskum. Íslendski blaðmaðurin er áhugaður í at fáa at vita, hvat Eivør ger, umframt at skriva og spæla tónleik sjálvandi. Hann hevur hug at fregnast um hvat tað er fyri ein sjeikur, sum hon sigst at ganga

**"Eg eri eitt sindur fráverandi og livi nógv í míni egnu verð. So eg hugsi ikki so nógv um tað, sum verður sagt og skrivað um meg."**

saman við. "Sjeikurin hjá mær eitur Pætur við Keldu. Hann býr í Keypmannahavn, har hann arbeiðir sum tónleikari", fortelur Eivør um unnusta sín, og íslendski blaðmaðurin er skjótur at spyrja meir um hendan góða Pætur. "Hatta var gott. Eg vænti at tú verður á forsíðuni. Men eg kann ikki lova tað." eru seinastu orðini hjá blaðmanninum, áðrenn tey bæði reisast frá borðinum. Eivør smílist og svarar, at tað var stuttligt, og so hugsar hon neyvan meira um tað. Leygardagin kemur blaðið út við stórari mynd av Eivør í kvøldarmyrkrinum í Reykjavík á allari forsíðuni.

Fjølmiðlaáhugin fyri Eivør er í hæddini nú undan útgávu-konsertini, men einki bendir á, at áhugin fer at minka burtur í bræði. Íslendska Séð og Heirt, sum líkist misteinkiliga nógv danska Se & Hør, hevur longu boðað frá, at tað ætlar sær við, tá Eivør seinni í hesum mánaðinum kemur til Føroya at hava útgávukonsert. Tað verður ikki fyrsta ferð at kendasti føroyingurin í Íslandi verður umtalaður í hesum blaðnum og neyvan síðstu ferð heldur.

Grundandi hvussu hon megnar at halda bæði bein á jørðini, hóast lívið sum tónleikari í Íslandi hevur kastað almennan áhuga á alt, sum hon fæst við, spyrji eg Eivør um hon veruliga er líka óávirkað av hesum, sum hon tykist.

"Eg eri eitt sindur fráverandi og livi nógv í míni egnu verð. So eg hugsi ikki so nógv um tað, sum verður sagt og skrivað um meg. Og í hesum førinum er tað nokk ein fyrimunur. Men eg havi als onki ímóti, at fólk spyrja meg um alt møguligt. Sum tónleikari havi eg ofta brúk fyri at vera kend fyri at sleppa at spæla. So hatta er nakað man má taka við sum ein náttúrligan partur av tí at liva av sínum tónleiki. Eg haldi at man skal bara duga at taka tað róligt. Tað er ikki so farligt. Men tað eru sjálvandi nógvir mátar at vera kend uppá, og eg kann fyristilla mær at tað nokk ikki er so stuttligt hjá teimum, sum eru kend um allan heim og ikki fáa frið nakrastaðni."

Sum flestu onnur, ið javnan eru undir sjóneykuni hjá fjøl-miðlunum, kann Eivør við jøvnum millumbilum lesa søgur um seg sjálva, ið hon hevur ilt við at kenna aftur. "Men tað ger ikki so nógv um alt ikki passar. Sum oftast er bara stuttligt at lesa sovorðið", sigur Eivør, sum væl dugir at síggja tað stuttliga í at lesa um seg sjálva, at hon einaferð bleiv koyrd úr starvi á fiskavirkinum í Gøtu, tí hon altíð bað um frí til at sleppa at syngja. Arbeiðið á flakavirkinum í Gøtu er tað einasta "vanliga" arbeiðið, sum Eivør nakrantíð hevur havt. Hon bleiv ikki koyrd, hóast hon ofta mátti biðja sær frí til at syngja. Men hon gavst aftaná tríggjar mánaðir og bleiv soleiðis ongantíð ikki nakar støðufuglur í føroyskari flakavinnu.

Í føroyskum tónleiki hevur Eivør Pálsdóttir harafturímóti verið ein støðugur songfuglur í nógv ár. Síðan rødd hennara byrjaði at hoyrast til tónleikatiltøk av ymsum slag, hevur hon altíð ovfarið áhoyrararnar á tvífaldan hátt so at siga. Fyrst er altíð røddin. Hetta sangtalent, ið er heilt einastandandi, og sum hevur fingið eina ørgrynnu av tónleikaummælarum í Føroyum og uttanlands at spáa um eina gylta framtíð, tekur áhoyrarar á bóli hvørja ferð. Men bilsnið verður altíð uppaftur størri, tá aldurin hjá Eivør verður nevndur. Fyrr søgdu fólk undrandi "Er hon bara fimtan!". Nú, fimm ár seinni, siga tey við nøkulunda somu undran "Er hon bara tjúgu!".

Sjálv metir Eivør, at tónlistarliga lívsleið hennara byrjaði, tá hon var trettan ár. "Tá vann eg Ársins songrødd, og aftaná tað byrjaði eg at syngja til tiltøk so at siga hvørt vikuskifti". Eivør helt fram at framføra minst einaferð um vikuna tey næstu fimm árini. Nú veit hon, at hon gjørdi ov nógv av. "Fyri tveimum árum síðan møtti eg íslendsku sang-lærarinnuni Ólöf Kolbrún Harðardóttir á sangskúla í Føroyum. Hon hoyrdi beinan-vegin á mær, at mín rødd var púra útlúgvað. Tá hevði eg í fimm ár sagt ja til alt og bara sungið og sungið uttan at ansa eftir røddini. Eg hevði faktiskt sungið ov nógv, og hevði slitið røddina."

**"Mín rødd var púra útlúgvað. Tá hevði eg í fimm ár sagt ja til alt og bara sungið og sungið uttan at ansa eftir røddini. Eg hevði faktiskt sungið ov nógv"**

Ólöf Kolbrún gjørdi ikki mætari enn at bjóða Eivør at koma við sær til Íslands, so hon kundi fáa ta neyðugu hvíldina, soleiðis at røddin kom fyri seg aftur. Tá hevði Eivør longu sjálv spælt við tankan um at fara til Íslands, so hon var skjót at fara við. "Eg skuldi upprunaliga bara vera her ein mánað, men eg eri her enn.", sigur Eivør. Orsøkin er heilt einføld. Hon trívist í Íslandi.

Og Ísland sær út til at trívast við henni. Í einum lítlum hølum í einari síðugøtu til høvuðsgøtuna, har mest av øllum smærri sermerktir handlar halda til, sæst nýggja fløgan hjá Eivør, Krákan, í hvørjum vindeyga. Á gula skeltinum omanfyri stendur "12 Tónar". Her heldur lítla plátufelagið til, sum útgevur Krákuna.

Handan plátufelagið, sum undan útgávuni við Eivør ikki hevði givið so mikið sum eina einastu fløgu út, standa teir báðir Jóhannes Ágústsson og Lárus Jóhannesson, sum báðir síggja væl klæddir og væl nøgdir út

*Framhald á síðu 6*



